## Stórt IRF-avlop

Raksturin hjá IRF gav í fjør 7,8 milliónir í avlopi. Hetta er væl meira enn í 2006, tá ársúrslitið var 3,3 milliónir krónur. Inntøkurnar hjá felagsskapinum vóru í fjør hægri enn í 2006, eins og talan var um útreiðsluminking. Samlaðu inntøkurnar í 2007 vóru 71,8 milliónir krónur.



## E elski Førjar - eisini leygardagin

Tær tríggjar sýningarnar hjá E elski Førjar vóru útseldar eina viku áðrenn tær vóru spældar. Síðani blivu tvær eykasýningarnar settar á skrá – og tær vórðu útseldar í gjár. Tí hevur Norðurlandahúsið aftur sett tvær eykasýningar á skránna. Tær verða leygardagin kl. 16.00 og kl. 19.30 - og longu nú eru nógv atgongumerki seld. Pláss er fyri umleið 400 fólkum til hvørja sýning, og verður fult leygardagin, hava umleið 2800 fólk sæð framførsluna tá.

# Eg selji ikki Sandoynna fyri ein sess í løgtinginum

**Semjan í tunnilsbólkinum hjá samgonguni veitir onga sum helst trygd fyri, at Sandoyartunnilin verður gjørdur og tí kann eg ikki liva við hesum, sigur Gerhard Lognberg**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg ætli ikki at lata meg kroysta til at selja Sandoynna fyri eina tingmansløn.

Tað sigur Gerhard Lognberg, tingmaður úr Skopun.

- Tað er ov høgur prísur fyri at varðveita samgonguna, leggur hann afturat.

Sum tann einasti limurin í tunnilsbólkinum hjá samgonguni, vil hann ikki taka undir við tilmælinum, sum restin av bólkinum handaði løgmanni í gjár.



*- Hetta er ein slutur fyri ein slatur, men eg ætli ikki at selja meg, sigur Gerhard Lognberg*

- Tilmælið veitir onga sum helst trygd fyri, at Sandoyartunnilin verður gjørdur og tí er hetta eitt tilmæli, sum eg ikki kann liva við, sigur Gerhard Lognberg.

Hann sigur, at eftir tilmælinum skulu 50 milliónir setast av á fíggjarlógini til undirsjóvartunlarnar í 2009, 2010 og í 2011.

- Men í 2009 skal peningur takast burturav hesi játtan til at keypa verkætlanina um Eysturoyartunnilin frá tí privata partafelagnum.

- Hinvegin sigur tilmælið, at tá ið minst 150 milliónir krónur eru settar í felagið, sum skal gera Sandoyartunnilin, kann farast undir hann. Men tað er treytað av, at restin av fíggingini er útvegað.

- Men skal peningur brúkast burturav játtanini til at keypa Eysturoyartunnilin, verður tað í fyrsta lagi í 2012.

Hann sigur, at av tí sama hava vit als onga trygd fyri, at ætlanin er at fara undir Sandoyartunnilin fyrrenn í næsta valskeiði, ella kanska uppaftur seinni enn tað.

- Samstundis vil Bjørt Samuelsen ikki vátta, at farast skal undir Sandoyartunnulin í 2011.

### So má samgonga vera samgonga

Gerhard Lognberg sigur, at tað liggur framvegis í kortunum, at Eysturoyartunnilin skal gerast fyrst, tí hann skal brúkast at fíggja Sandoyartunnilin við.

Hinvegin hevur Bjørt Samuelsen eisini gjørt greitt, at báðir undirsjóvartunlarnar skulu ikki gerast ísenn.

Gerhard Lognberg sigur, at tí kann hann ikki góðtaka tilmælið, so má samgonga vera samgonga.

- Einasta endamálið við hesum tilmælinum er at rura meg í blund og samstundis at kyrra teir politikarar, sum eru ímóti Sandoyartunlinum.

- Samstundis ber hetta tilmælið í sær, at eg skal hava avgerandi atkvøðuna í at avtaka lógina, sum sigur, at farast skal undir Sandoyartunnilin 1. november í 2009 og tað er at krevja ov nógv av mær, samstundis sum ongin trygd er fyri, nær so kann farast undir tunnilin.

Gerhard Lognberg staðfestir, at hann er so vónbrotin av arbeiðnum í tunnilsbólkinum, at hann hevur ikki orð fyri tí. Men hann ásannar eisini, at hann er mest vónbrotin av sínum partafólki í Javnaðarflokkinum, tí summi javnaðarfólk hava longu góðtikið tilmælið hjá tunnilsbólkinum.

# Óðamannaverk at gera Sandoyartunnilin fyrst

**Semjan í tunnilsbólkinum hjá samgonguni tryggjar, at farast kann undir undirsjóvartunnilin í Eysturoynna heilt skjótt og tað er óðamannaverk at fara undir Sandoyartunnilin fyrst, sigur Bill Justinussen**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað, sum eg legði størst dent á, at farast kann undir undirsjóvartunnilin í Eysturoynna sum skjótast.

Tað sigur eysturoyartingmaðurin, Bill Justinussen, sum eisini var limur í tunnilsbólkinum hjá samgonguni.

Hann sigur, at í tilmælinum hjá bólkinum hevur hann tryggjað sær, at arbeiðið upp á Eysturoyartunnilin kann byrja rættiliga skjótt.

Bill Justinussen sigur, at arbeiðið hjá privata tunnilsbólkinum hevur ligið í dvala leingi, tí bíðað hevur verið eftir einari politiskari avgerð.

- Skulu landsstýrið og privata partafelagið nú undir samráðingar um, hvørjum treytum partafelagið skal sleppa at gera tunnilin eftir, stúri eg fyri, at tað fer at ganga drúgv tíð, áðrenn arbeiðið kann fara ígongd, tí talan er um sera torførar samráðingar

Bill Justinussen vísir á, at talan er um samráðingar, sum ikki hava sítt fordømi nakrastaðni í Evropa, men sum samstundis koma at skapa fordømi fyri framtíðina.

- Samstundis skerst ikki burtur, at nógvir politikarar eru ímóti, at eitt privat felag ger Eysturoyartunnilin og tað hevði eisini elvt til trupulleikar.

Av tí sama stúrir hann fyri, at tær verða drúgvar og at Eysturoyartunnilin sostatt verður skotin langt út í framtíðina.

- Tí meti eg, at skal tað bera til at fara undir Eysturoyartunnilin í næstu framtíð, er tað best, at tað almenna yvirtekur verkætlanina, tí samráðingar við privata felagið um eitt hóskiligt endurgjald, kunnu fáast frá hondini rættiliga skjótt.

- Hetta er ein loysn, sum tryggjar, at ferð kemur á arbeiðið at gera Eysturoyartunnilin, so at farast kann undir hann í næstu framtíð.

### Óðamannaverk

Hinvegin fæst hann ikki beinleiðis at siga, at Eysturoyartunnilin skal gerast áðrenn Sandoyartunnilin.

Men hann staðfestir, at Eysturoyartunnilin kastar pening av sær til samfelagið, men at Sandoyartunnilin ikki ger tað.

- Tí er tað óðamannaverk at hugsa tann tankan, at Sandoyartunnilin verður gjørdur áðrenn Eysturoyartunnilin.

- Eg eri rættiliga vísur í, at ongin politikari er so ørur, at hann hugsar tann tankan, leggur hann afturat.

Hann sigur, at undir øllum umstøðum verður ikki klárt at fara undir Sandoyartunnilin fyrrenn um eini tvey, trý ár.

- Tá kann arbeiðið upp á Eysturoyartunnilin verða komið rættiliga langt, áðrenn tað verður klárt at seta borin í Sandoyartunnilin, tí eg síggi fyri mær, at arbeiðið at bora Eysturoyartunnilin kann byrja seint næsta ár.

Hann staðfestir eisini, at tað stendur ikki í tilmælinum frá tunnilsbólkinum, at farast skal undir Sandoyartunnilin í 2011.



*- Tað stendur ongastaðni í semjuni hjá tunnilsbólkinum, at farast skal undir Sandoyartunnilin í 2011 og eg eri rættiliga vísur í, at ongin politikari er so ørur, at hann setir upp á at gera Sandoyartunnilin áðrenn Eysturoyartunnilin, sigur Bill Justinussen*

- Tilmælið er, at tað kann farast undir hann í 2011, men tað kann eisini vera seinni, tað veldst alt um umstøðurnar.

- Tað kunnu allir møguligir trupulleikar taka seg upp, bæði av fíggjarligum og tekniskum slag og tí er tað burturvið at áseta ein nágreiniligan dag.

Bjørt Samuelsen hevur eisini boðað frá, at báðir tunlarnir verða ikki gjørdir ísenn.

- Eitt er at gera tveir tunlar ísenn. Eitt annað er, at tað er ikki neyðugt, at Eysturoyartunnilin er púra liðugur, áðrenn farið verður undir Sandoyartunnilin.